## Hús í Klaksvík til sølu.



**Ognin á Brekku 25 til sølu, um hóskandi boð fæst.**

Matr. nr. 594
Grundøki: 582 m2
Húsini: uml. 116 m 2 í tveimum hæddum + grovkøk og hjall.
Hetta eru timburhús á betonggrund, kløðd við plastikki og hava Decratak.

Garður er um húsini sum liggja tætt við miðbýin og hava gott útsýni.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791**



## FDS starvsfólk

Av tí, at eitt av starvsfólkunum á teknisku deild hevur leitað sær nýggjar avbjóðingar, verður søkt eftir fólki til at arbeiða við digitalari kortgerð í sambandi við skráseting av leiðingum v.m. at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið**
Starvið fevnur um uppsetan og supportering av telduskipanini hjá kommununi, herundir eisini skráseting av teknisku veitingum kommununnar t.d. vegum, kloakk – og vatnleiðingum.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú ert byggifrøðingur, telduatstøðingur ella hevur samsvarandi útbúgving/royndir innan digitala kortgerð, er fyrikomandi, nærlagdur og kann arbeiða sjálvstøðugt. Alt skrásetingararbeiði verður gjørt við Microstation, og tí er ynskiligt, at tú hevur kunnleika til hetta forrit.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær Boða Haraldson, býarverkfrøðing ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum tilmælum skulu vera Tórshavnar komunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. august 2006. Viðmerk á umsóknina „FDS starvsfólk".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

## Hús í Klaksvík til sølu.



**Ognin Heygavegur 10 til sølu um hóskandi boð fæst.**

Matr. nr. 1062
Grundøki: 450 m2
Húsini: ca. 7,50 x 9,00 m í tveimum hæddum

Húsini eru úr betongi, bygd í 1950, kløðd við timbri, hava tætt tróður og eri takt við jarni.

Garður er kring húsini, sum liggja í friðarligum umhvørvi og eru í góðum standi.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791**

## Koyrikort til motorsúkklu?

Teoriskeið til motorsúkklu byrjar týsdagin 22. august kl. 19.30

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

# Sølufólk

MARU SEAFOOD

Vegna vaksandi virksemi, søkja vit dugnaligt sølufólk at byrja skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í altjóða handli, har tú veruliga sleppir at royna teg í einum spennandi umhvørvi.

*Vit ynskja at tú ert:*
- arbeiðsom/samur
- hevur góð samstarvsevni
- megnar at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl enskt í skrift og talu

Løn og treytir sambært avtalu, og eru vit spent at frætta frá tær.

Meiri fæst at vita, við at venda sær til Jóhan Páll Joensen, tel. 216456.

*Umsókn verður at senda til:*
MARU Seafood P/F
Att.: Jóhan Páll Joensen
Postboks 318
700 Klaksvík

*Umsóknarfreistin er 28. august 2006*

*MARU Seafood P/F, við heimstaði í Klaksvík, er íløgu- fíggingar og sølufelag, sum, umframt at umsita dóttirfeløg, selur framleiðsluna hjá Kósini P/F, Norðís P/F og Eystís sp/f. Eisini selur felagið framleiðsluna hjá einstøkum øðrum føroyskum fiskaframleiðarum.*

*Í MARU Seafood P/F samtakinum eru umleið 275 starvsfólk á sjógvi og landi, og selur felagið fyri umleið 300 mió. kr. á altjóða marknaðinum.*

## Jørð til sølu í Funningi

Tvær gyllin og 16 skinn. Fremra gonga í Líðini og 3352 fermetrar innangarð. Verður selt samlað.

**Tlf. 422267**

Lesið **Sosialin** -tað loysir seg